# Nógv er gjørt men nak

**Borgarstjórin í Sørvági, Jákup Suni Lauritsen, er klárur til ein túr aftrat sum skipari á kommunalpolitisku skútuni Sørvágur. – Hóast ógvuliga nógv er komið av skafti, stendur kommunan kortini ikki í skuld, sigur borgarstjórin**

KOMMUNUVAL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað verða tríggir listar, sum bjóða umboð fram til teir 7 sessirnar í Sørvágs bygdaráð. Og á einum av teimum listunum stendur navnið Jákup Suni Lauritsen, sitandi borgarstjóri. Hann er nevniliga til reiðar at taka eitt tørn aftrat í bygdaráðnum.

Men tað verður í Sørvági, tí bygdin vil ikki leggja saman í somu »øði«, sum Miðvágur og Sandavágur gera tað.

– Eg sigi ikki, at vit ikki skulu gera tað, eg sigi bara, at skjulu vit gera tað, skulu vit gera tað ordiligt. Vit skulu hava eina greiða tilgongd, sigur Jákup Suni Lauritsen.

Hann heldur eisini, at útmeldingarnar frá landsstýrinum eru ógvuliga ógreiðar og mótsigandi.

– Teir siga seg vilja leggja økir út á kommunurnar um tær leggja saman. Og nú siga teir, at ein nýggjur kommunureformur skal koma í gildi 1. januar 2011, men samstundis verður sagt, at teir ikki vilja leggja kommunurnar saman við lóg, sigur Jákup Suni Lauritsen.

Men at Miðvágur og Sandavágur leggja saman skilir Jákup Suni Lauritsen væl, tí tær hava framman undan eitt so tætt samstarv. Teir samstarva um bæði skúla, brandlið, havnina og vatn.

– Tá mann hevur livað so leingi saman er væl eisini tíð upp á, at fáa pappír upp á hvønn annan, sigur Jákup Suni Lauritsen.

## Flísar á gongubreytunum

Tá prátið fellur inn á avrikingarnar í nú skjótt farna skeiði, hevur borgarstjórin nógv at greiða frá.

– Eg haldi, eg kann siga, at tað er ómetaliga nógv hent í hesum valskeiðinum. Eitt av tí fyrsta vit fóru undir, var ein nýggj egningarmiðstøð, sum veruliga er eitt prýði á keiini. Eitt annað, vit skjótt fingu gjørt, var at fáa keypt nýggjan brandbil, nakað, sum leingi hevði ligið á láni tá, sigur Jákup Suni Lauritsen.

Eitt onnur stór verkætlan, sum kortini fór í gongd undir undan farna bygdaráði, er barnagarðurin.

– Men hann var júst farin í gongd, tá hetta bygdaráðið tók yvir, so tað eru vit, sum hava umsitið bygginginа. Eitt annað av tí fyrsta vit gjørdu, tá vit tóku við, var at leggja nýtt grasliki á fótbóltsvøllin í Sørvági. Í dag spælir 07 Vestur sínar dystir í Sørvági, sigur Jákup Suni Lauritsen.



Jákup Suni Lauritsen, borgarstjóri í Sørvágs kommunu

Borgarstjórin sigur, at bygdaráðið hevur gjørt nógv fyri at fríðka um í bygdini, og nevnir millum annað, at 1000 trø eru plantað.

– Vit hava eisini gjørt nógv við at laða innara garðin á vegnum fram við sjónum, og tað eru vit omnir í helvt við. Og so tók Tobbi einaferð skemtandi til, at hann kendi bert tveir býir í heiminum, har allar gongubreytir vóru lagdar við flísum, og tað var Monaco – og Sørvágur! sigur Jákup Suni Lauritsen.

## Fýra bygdir

Men Sørvágs kommuna er ikki bara Sørvágur.

– Vit hava jú fingið bæði Bø, Gásadal og Mykines upp í kommununa, og tað vísir jú í sjálvum sær, at vit ikki eru ímóti samanlegging, sigur Jákup Suni Lauritsen.

Og eisini tær tríggjar smærru bygdirnar hava notið gott av at koma undir størri veingir.

– Vit hava skapt grundarlag hjá ungum fólki at seta búgv í kommununi. Vit hava byggibúnað 21 grundstykkir í Hagagerði her í Sørvági, umframt 10 í Billubønum. Eisini í smærru bygdunum hava vit skapt møguleikar fyri at seta búgv, og vit hava gjørt eitt veganet til sjey grundstykkir í Bø og fimm í Gásadali, sigur borgarstjórin.

Í Gásadali er eisini øll bygdin asfalterað, og miðbygdin pyntað og snøggað. Somuleiðis hava teir laða garðar miðbygdini í Gásadali, og tað sama eru teir byrjaðir upp á í Bø.

Heldur ikki Mykines hevur verið við sviðusoð.

– Vit hava gjørt reinsiverk til

Sørvágur er nú vetrarfriðaður fyri seyð, og her eru menn í holt við at hegna bygdina inni



